# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Gudstænastur 14. sunnudag e. trin.**
***Vesturkirkjan:*** kl. 11 Hanus Simonsen
***Havnar kirkja:*** kl. 11 Sverri Steinhólm, altargangur, skriftamál kl. 10,40
***Nólsoy:*** kl. 12 Sonja Klein, altargangur, skriftamál kl. 11,40
***Kollafjørður:*** kl. 11, Marjun Bæk
***Sandavágur:*** kl. 11 – Inga Poulsen Dam
***Bøur:*** kl. 11 altargongd David Johannesen
***Skála:*** kl. 11, altargangur, Jógvan Fríðriksson
***Glyvrar:*** kl. 11, Meinhard Bjartalíð
***Gøta:*** kl. 11, Martin R. Jacobsen
***Haldórsvíkar kirkja:*** Sølva Ford syngur solo. Mogens Tilsted Christensen
***Elduvík:*** kl. 12, altarg., Uni Næs
***Kirkja:*** kl. 12, altart.,
***Hattarvík:*** kl. 17, altarg., Elsa Funding
***Christianskirkjan:*** kl. 11, lestur
***Skálavík:*** kl. 12, Jákup R. Hansen
***Fámjin:*** kl. 12, altargongd, Jónsvein Bech.
***Sandvík:*** kl. 18 Jónsvein Bech
***Hovs kirkja:*** kl. 12, v. Símun Jacobsen.
***Leiti:*** kl. 12, Patrick de Neergaard

**Evangelisk møtir í Losjuni í Havn**
Fríggjakvøldið 7. sept. kl. 20, leygarkvøldið 8. sept. kl. 20 og sunnukvøldið 9. sept. kl. 18. Talari: Dooley úr Íslandi. Sangur: Herman, Gigga og onnur. Tórmund og fleiri luttaka. Kaffi aftaná møtini.

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv.75*
Møti:
Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting.
Sunnudagsskúli kl. 12.00
Sunnukvøldið kl. 18.00 Evangeliskt møti
Mánakvøldið kl 20.00 Bønar/uppbyggingarmøti, vitjan úr Hetlandi.

**KFUM og KFUK í Havn**
Hósdagin 6. sept. kl. 15.00 í KFUK: Seinnaparts-samkoman: Magnus Brahé Jørgensen. Evni: Úr Føroya kirkjusøgu.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 bíbliugransking og barnabíbliutími. Kl. 11 gudstænasta, Odd Fuglestad.

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20 møti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á Norðasta Horni, kl. 18 Møti v/ Jústines Poulsen.

**Frá Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Hósdagin 6. sept. kl. 20 Bíbliutími - 2. Kor. 3 við Gunnar Reynslág.
Fríggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/ Magna Christiansen
Sunnudagin kl. 11 Sunnudagsskúli.( Liggur í gudstænastutíð.)
Sunnudagin kl. 18 Møti við Hanus Simonsen, presti, Tórshavn.
Sí annars www.koma.fo

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti**
Hósdagin kl. 7.00 bønarmøti, kl. 20.00 ungdómsmøti.
Fríggjadagin kl. 7.00 bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Guðstænasta V/Tóra Slættalíð, kl. 14.00 sunnudagsskúli.
Mánadagin kl. 17.15-18.00 venur barnakórið kl. 20.00 bønamøti.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
Fríggjakvøldið kl. 21 verður ungdómsmøti.
Sunnumorgunin kl. 10.30 familjumøti.
kl. 11.30 Samfelagsløta
kl. 12 Tilbiðjunarmøti.
Barnaansing undir báðum møtinum.
Týskvøldið kl. 20, møti á Brekku 3.
www.livdin.fo

**Aftankvirra**
verður í Havnar kirkju fríggjakvøldið 7. sept. kl. 21.00 – 23.00.
Kl. 22.00 spæla Gudmund Mortensen urgu og Tóri Restorff Jacobsen cello.
Kl. 22.30 andakt.

**Katólska kirkjan**
Hósdagin 6. september verður Taizé-kvøld (bønarstund v/ sálmasangi úr Taizé) í Kerit. Øll eru vælkomin.
www.katolsk.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Leygardagin einki Flare vegna legu.
Sunnudagin kl. 10.45 Morgunmøti - Hildibrandur Olsen talar, kl. 11.30 barnagudstænastan.
www.filadelfia.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Fríggjakvøldið kl. 21 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, kl 18 tilbiðjannarmøti.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.
http://www.gospel.fo

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Hósdagin kl. 20 heimaforbund, allar kvinnur vælkomnar.
Sunnudagin kl. 11 halgunarmøti, kl.14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti.
Øll eru hjartaliga vælkomin
www.frelsunarherurin.fo

**Ebenezer**
Hósdag kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudag kl. 11.00 Minnismáltíð Harrans,
kl. 12.00 Sunnudagsskúli,
kl. 18.00 Evangeliskt møti - Operation Christmas Child.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Frá Meinigheitshúsinum í Havn**
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti v. Pól Johannesen, evni: sjálvsvirði.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 18.00 Møti v. Øssur Kjølbro, evni: Jesu afturkoma.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tórshavnar hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangeliskt møti.
Øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Miðvágur**
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 16 bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Dánial á Dul Jacobsen talar.
Mikukvøldið kl. 20 bønarmøti.

**KEDRON í Sørvági**
Leygardagin 8.9.2007.
Verður áhugavert skeið, Heitið: á ferð í gjøgnum Gamla Testamenti, Skeiðið verður hildið í Kedron í Sørvági, nærri fæst at vita um tilmelding, kostnað og kunning hjá Heðin Poulsen á Telefon 218 115. Avmarkað pláss, so geri skjótt av at tekna tykkum.
Sunnudagin 9.9.2007.
Breyðbróting við læru kl. 11.00.
Evangeliskt møti kl. 18.00.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
***Børnini at Møtast:***
***Børnini møtast kl. 11.00 í kjallaranum í KEDRON, har ØLL børn eru hjartaliga vælkomin.***
Mikudagin 12.9.2007.
Bønarmøtið verður í Kedron kl. 20.00.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Sunnudagsskúli kl. 14 sunnudagin og møti kl. 18.00
Bíbiltími verður týskvøldið kl. 20.00
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Bønhúsið í Søldarfirði**
Møti sunnukvøldið kl. 18 v. Ólavi Jacobsen og John Myllhamar. Innsavning til missiónsarbeiðið.

**Bønhúsið á Hellunum**
Møti sunnudagin kl. 16.30, v. John Myllhamar og Ólavi Jacobsen. Innsavning til missiónsarbeiðið.

**Missiónshúsið Karmel, Eiði**
Sunnukvøldið kl. 19 Møti við Egil Joensen.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Evangeliskt tiltak »Møt Jesusi«.
Sunnumorgun kl. 10.30 Møti.
Øll hjartaliga vælkomin

**Missiónshúsið í Gøtu**
Møti verður í kirkjukjallaranum sunnukvøldið kl. 18.00. Arne Vatnhamar úr Leirvík talar.

**Vestmanna Missiónshús**
Sunnudagin kl. 18.00 møti.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Awake við Arna Abrahamsen.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Paula Høj. Sangur við Martin í Grund. Barnamøti kl. 17.
PREP-skeið verður í Kelduni í september. Til ber at tekna seg á tlf 442054 ella 581512. Meira fæst at vita á www.keldan.fo
Vælkomin í Kelduna.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Niels J. Nielsen og kl. 21 ungdómsmøti við Jákup Petersen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria!**
Hóskvøld kl. 20.00 ungdómsmøti.
Sunnukvøld kl. 18.00 møti.
Mánakvøld kl. 20.00 bønarmøti og bíbliutími.
Tú er hjartaliga vælkomin!

**KFUM & K, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 22.00 - opið hús.
Leygarkvøldið kl. 20.00 - Hugnakvøld(skeið byrjar).
Sunnudag
kl. 14.00 - Sunnudagsskúli
kl. 18.00 - Møti v/ Una Næs
kl. 21.00 - Ungdómsmøti.

**Getsemane, á Brekku 19**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 ungdómsmøti við André Matras . Leygardagin kl. 10 morgunbøn.
Sunnudagin kl. 14 møti við André Matras. Sunnudagsskúlin er samstundis.
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunbøn.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 17.30 bøn- & lovsangur. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mikudagin kl. 20 bíbliutími 1. Joh.br. 3. kap. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Elim, Sandur**
Hesi møti verða um vikuskiftið. Leygardagin kl. 20 og sunnudagin kl. 17. Osvald Kjærbo, Tórshavn, talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Aglow Suðuroy**
Møti verður í Fylking á Tvøroyri leygarkvøldið 8/9 kl. 19.30. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Betania í Porkeri**
Á fundinum tórsdagin kl. 20 talar Robert McLuckie.

**Meinigheitshúsið, Vágur**
Leygarkvøldið kl. 20 verður møti við Jónhildu og Gulak Hansen. Kaffi aftaná.
Sunnukvøldið kl. 18 verður møti við Jónhildu og Gulak Hansen.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Hvalba**
Møti í missiónshúsinum í Hvalba kl. 18 v. Simun Jacobsen.

**Roynhøllin / Hvalba**
Sangløta verður leygarkvøldið kl. 20. Felagssangur, solosangur og drekkamunnur. Solosangarar eru m.a Finnbjørn, Svein, Óluva, Randi
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Hovi**
Møti verður sunnudagin kl. 18.00 við Jógvan Højgaard trúboðara.

**Ørkin, Reykjavík**
Møtini vera hvønn sunnudag kl. 17.00 á Ørkini!

**Frá Eysturoyar gongufelag**
Farið verður til Suðuroyar leygardagin 8. september kl. 7 av Havnini, og koma aftur sunnukvøldið.
Tilmelding við depositum á kr. 200,- á konto nr. 9865-103.338.1 í Norðoya sparikassa í seinasta lagi hósdagin 6. sept..
Høvuðstúrurin (sum er miðal) verður millum Nes (Hvalba) og Trongisvág. Ferðarleiðari verður Álvur Enni. Eru spurningar so ring Kristian Martin tlf. 77 51 00 ella Óla tlf. 25 42 72.

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
*tlf. 316491 · fax 316481*
*Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00*
*Teldupostur: tilhald@torshavn.fo*
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks*
***Mánadagin 3. sept.***
kl. 10.00 – Fimleikur v / Grete Ellingsgaard.
***Loppumarknaður er alla vikuna í kjallaranum***
***Týsdagin 4. sept.***
kl. 10.00-11.30 Sangløta v/ Óla Vang
***Mikudagin 5. sept.***
Opið hús
***Hósdagin 6. sept.***
kl. 10.00 – Fimleikur v / Grete Ellingsgaard
***Fríggjadagin 7. sept.***
Opið hús
Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks, somuleiðis kort og spøl. Ver vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.

**Dagtilhaldið í Luffustovu**
Vit byrja aftur 4. september kl. 15. Øll eldri eru hjartaliga vælkomin.

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum**
Vit hava opið týsdag og hósdag millum kl. 15 og 18, vit eru byrjaði aftur.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
hevur opið mánadag og mikudag frá kl 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðini til taks.
***Mánadagin 10. sept.***
Vit fara útferð til Skálavíkar, har vit vitja Barnhús og Jarðamóðurstykkið. Palli Dalsgaard vísir okkum runt. Aftaná fáa vit drekka í Skálavík. Kostnaður fyri 30,00 kr fyri hvønn. Koyrt verður úr Tilhaldinum kl. 14.10 stundusliga.
***Mikudagin 12. sept.***
Boccia í kjallaranum.

**Tilhaldið á Toftum, tlf 448690**
***Nú byrja vit aftur***
***Týsdagin 4/9***
Opið hús
***Mikudagin 5/9***
Boccia
***Hósdagin 6/9***
Lær at SMS`a
(Tak fartelefonina við)

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Opið er:
Mánadag og mikudag kl. 13.30-17.30.
Týsdag og Hósdag kl. 9.30-17.30
Teldupostur: dagtilhaldid@post.olivant.fo
***Mánadag***
Tilmeldan til døgurða týsdag áðrenn kl 17.00 á tlf. 459091
***Týsdag***
kl. 9.30 Gongutúrur
kl. 11.00 bløðini verða lisin fyri sjónveikum
kl 12.00 Døgurði
***Mikudag***
kl. 13.30 Telda
***Hósdag***
kl. 10.00 fimleikur
kl. 11.00 telda
kl. 13.30 bløðini verða lisin fyri sjónveik
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Vágs Pensionistafelag og Dagtilhaldið**
gera útferð 17.-19. august. Gist verður á Runavíkar Sjómansheimi. Tey, ið vilja koma við, skulu tekna seg á tlf. 373446, 373285 ella 373261 áðrenn 1. august.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**80 ár**
Mánadagin 10. september verður Anna Jacobsen, Nólsoy 80 ár. Dagurin verður hildin heima sunnudagin 9. sept.